# Hvussu fáa vit feskfiskaveiðuna at geva avkast aftur ?

Kári Petersen, búskaparfrøðingur

# Søguliga gongdin

Tá tað gongur væl, so vilja nógvir koma inn í fiskivinnuna

Í 80unum lat landskassin nógvan studning, veiðitrýstið vaks og stovnarnir minkaðu

Tað var umrøtt at minka flotan,  men sagt varð, at tað ber ikki til at fiska 100.000 tons við minni flota

Kreppan í 1992-94:

Flotin minkaði 40 %, og tá fiskurin kom aftur, fiskaðu vit aftur 100.000 tons

Fyrstu ferð í fleiri ártíggjur fekk feskfiskaflotin yvirskot

Síðan 1996 fiskidagaskipan

Ov nógvir dagar vóru í skipanini

Línuflotin fór at nýta fiskidagarnar meir intensivt

Beint eftir ár 2000 var yvirskot í fiskivinnuni og nógv veiðiorka kom inn í vinnuna

Djúpvatnstrolararnir komu inn á innaru landleiðina og øktu trýsti á tosk og hýsu

Støðugt betri fiskiútgerð og fiskileitiútgerð

Uttan mun til orsøkina, so er flotin nú ov stórur til fiskiveiðuna

# Skip í feskfiskaflotanum

| Tal av skipum í uppgerðunum | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | | | | | | | | | |
| | **1998** | **1999** | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** | **2012** |
| Partrolarar | 28 | 28 | 30 | 30 | 28 | 28 | 26 | 26 | 22 | 27 | 20 | 26 | 22 | 24 | 24 |
| Lemmatrolarar | 12 | 12 | 12 | 11 | 10 | 12 | 12 | 12 | 14 | 13 | 10 | 9 | 8 | 8 | 10 |
| Línuskip | 15 | 16 | 18 | 20 | 21 | 22 | 21 | 23 | 24 | 24 | 23 | 19 | 16 | 17 | 16 |
| Garnaskip | 8 | 8 | 8 | 8 | 8 | 8 | 7 | 6 | 5 | 5 | 7 | 6 | 6 | 4 | 4 |
| **Feskfiskaflotin** | | | | | | | | | | | | | | | |
| **u. útróðrarbátar** | **63** | **64** | **68** | **69** | **67** | **70** | **66** | **67** | **65** | **69** | **60** | **60** | **52** | **53** | **54** |
| | | | | | | | | | | | | | | | |
| Kelda: Roknskaparuppgerð, Grannskoðanarvirkið Nota. | | | | | | | | | | | | | | | |

# Hvussu hava vit klára tað ?

Veiða hjá feskfiskaflotanum

| (t tons) | 1999 | 2001 | 2003 | 2005 | 2007 | 2009 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur | 19 | 28 | **37** | 19 | 13 | 11 | **12** | **9** |
| Hýsa | 17 | 15 | 25 | 20 | 13 | 5 | 3 | 3 |
| Upsi | 31 | 45 | 43 | 62 | 55 | 53 | 28 | 33 |
| | | | | | | | | |
| Avr.virði(mkr) | 1003 | **1324** | 1208 | 1146 | 1164 | 772 | **828** | **766** |

Úrslit áðrenn óvanligt

| (m kr) | 1999 | 2001 | 2003 | 2005 | 2007 | 2009 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Partrolarar | 36 | 74 | -8 | 9 | -20 | -44 | -8 | -56 |
| Lemmatrolarar | 3 | 2 | 7 | 2 | -7 | -17 | -3 | -11 |
| Línuskip | 13 | 21 | 28 | -5 | -5 | -11 | -12 | 0 |
| Garnaskip | 9 | 11 | 2 | 2 | -6 | -8 | 0 | 0 |
| Feskfiskaflotin u. útr.bátar | 61 | **108** | 29 | 8 | -38 | **-62** | -33 | -67 |

Hallið í 2008 var 124 m kr. Frá 2007 til 2012 er talið av skipum **minkað úr 69 niður 54**

# Vanlig gongd í búskapi

Høvuðsvinnur skulu geva avkast

Gera íløgur,  fáa yvirskot, og um ongar avkastgevandi íløgur kunnu gerast í fiskivinnuni, so má uppsavnaða yvirskotið nýtast til at gera íløgur í øðrum vinnum

# Skaðilig tiltøk

Viðgerð av symptomum, óbeinleiðis stuðul:

Minstaløn

Skattafyrimunir

Lata makrelkvotu og Flemish Cap banka kvotu til feskfiskaflotan

Loyva lágløntum útlendingum á feskfiskaveiði

Heldur fast í yvirkapasitetinum

Ger at fólk og kapitalur ikki flytir yvir í aðrar vinnur

Halda ov nógvum skipum og fólki føstum í flotanum

Politikarar stuðla ikki produktivitetsvøkstri

Politikarar mótarbeiða produktivitetsvøkstri og búskaparvøkstri

# Skaðilig tiltøk

Sjúkutekin:

Lágt avkast

Lágar hýrur – torført at fáa fólk

Ongar nýíløgur (nýíløgur eiga at vera drívmegin í produktivitetsvøkstrinum)

Gamal og ótíðarhóskandi floti

Politikararnir hava ført albylpolitikk seinastu 10-15 árini. Tiltøkini hjá landsstýrinum hava verið eins virkin og albyl uppá krabbamein, tey hava minkað nakað um symptomini, men einki gjørt við sjúkuna

Sjúkan, yvirkapasitetur, er tí vorðin verri ár um ár

# Niðurstøða

Ongin loysn fæst innanfyri verandi skipan

Torført, í øllum førum politiskt ómøguligt, at minka fiskidagatalið

Um fiskidagatalið nú verður minka so nógv sum tilráðingarnar siga, so fer allur feskfiskaflotin á húsagang

Um tað gongur betri og stovnurin veksur, so eru nógvir bátar og skip sum skjótt kunnu fiska stovnin niður aftur

Uttan mun til um vit halda, at vánaliga støðan stavar frá yvirfisking ella av broytingum í náttúrúni, so er fiskidagatalið alt ov stórt

Ómøguligt at minka veiðitrýstið nóg skjótt við verandi skipan

Neyðugt at gera eitt munandi inntriv
Neyðugt at gera eitt annað slag av inntrivi

# Strukturtiltøk aðrastaðir

Landbúnaður, t. d. Frakland og Danmark

Strukturtillagingar henda alla tíðina

Eldri menn selja, tá teir leggja frá sær

Garðar verða lagdir saman

Meir kapital og minni arbeiðsmegi, produktivitetsøking

Virkar, tí tey sum flyta frá landbúnaði til ídnað fara upp í løn

Henda stigvísa og umleggingin virkar sera illa í Føroyum, tí lønin hjá teimum, ið virka í feskfiskaflotanum verður hildin uppi við politiskum inntrivum, so reiðarar og fiskimenn ikki merkja, hvussu illa tað í veruleikanum stendur til í feskfiskaflotanum

# Upphøgging (kondemnering)

Fígging: Tilfeingisgjald

Byggir á fiskidagaskipanina

Yvirkapasiteturin er fiskidagar

Fiskidagar sum mugu keypast út

# Upphøgging

Fyrireiking:

Um 2 ár verða allar serskipanir fyri fiskivinnu avtiknar: Stuðul skattaskipanir, makrelkvotur. So vita vit, hvat feskfiskaveiðan í veruleikanum gevur

Umhugsunartíð 1-2 ár: So vita vit, hvør ynskir at halda fram í feskfiskaflotanum uttan serskipanir (óbeinleiðis stuðulsskipanir)

# Upphøgging, øvut auktión

Tað eru altíð nakrir, sum hava eitt hægri ynski um at gevast enn aðrir. Fleiri vilja gevast, um teir fáa eina hóskandi upphædd fyri tað. Grundgevingarnar kunnu vera ymiskar:

Nakrir tí teir eru vorðnir eldri

Nakrir tí báturin ikki gongur so væl

Nakrir tí skipið ella báturin er so gamal

Nakrir tí teir ikki nýta bátin so nógv sum teir hava ætlað

Ein skipan sum kann fáa fram hvør tað er, sum ynskir at halda fram og hvør ynskir at gevast, er ein øvut auktión.

# Upphøgging, øvut auktión

Øvut auktión:

Teir sum ynskja at gevast, vilja selja bíligast

Tann sum vil halda fram, vil bert selja dýrt

Tá nóg nógvir hava bjóðað, so nóg nógvir fiskidagar eru seldir, so allur yvirkapasiteturin er burtur, fáa allir tann hægsta prísin (marknaðarprísin)

Fiskidagar, sum hava verið óbrúktir seinastu 3-5 árini, verða keyptir fyri umleið 15-20% ? av marknaðarprísinum

# Øvut auktión



# Kondemnering og hvat so ?

Nakrir búskaparfrøðingar halda at tað er óðamannaverk at kondemnera

Tá feskfiskavinnnan aftur gevur avkast, fara føroysku politikararnir bara at økja um veiðitrýstið aftur og lata nýggja veiðiorku koma inn inn í vinnuna

# Umsitingarreglur, kvadratrótin

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Útróðarbátar | | | Línuskip | | |
| 16 | 9 | 9 | | 100 | |
| 34 | | | = | 100 | ? |

Kvadratrótin !

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| $\sqrt{16}$ | $\sqrt{9}$ | $\sqrt{9}$ | = | $\sqrt{100}$ |
| 4 | 3 | 3 | = | 10 |

# Hvussu forða vit kapasitetsøking ?

Rættvísandi tilfeingisgjald:

Uttan mun til um ein nýtir uppboðssølu ella eitt útroknað tilfeingisgjald, so skal tilfeingisgjaldið samsvara við marknaðarvirði á fiskidøgum

Tilfeingisgjaldið pr. fiskidag skal hækka, tá veiðan økist, og fiskaprísurin hækkar

Harvið verður yvirskotið ikki so høgt, tey góðu árini

Trýstið á politisku skipanina um at økja kapasitetin minkar

Tá skip skulu skiftast út, og veiðirættindi flytast frá gomlum skipum til nýggj, má tað vera ein óheftur stovnum, sum ger útrokningina av veiðiorkuni

Fiskidagatalið má minka við árligu produktivitetsøkingini. Óheftur stovnur má gera útrokningina.

# Avkastgevandi floti

Minni floti

Betri úrslit

Betri hýrur

Javnari úrslit

Ikki neyðugt at hava óbeinleiðis studningsskipanir til fiskivinnuna (minni útreiðslur á fíggjarlógini og í Trygdargrunni Fiskivinnunar)

# Tilmæli hjá Havstovuni

| **Tilmæli hjá Havstovuni.** | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | |
| | **2003-2004** | **2004-2005** | **2005-2006** | **2006-2007** | **2007-2008** | **2008-2009** | **2009-2010** | **2010-2011** | **2011-2012** | **2012-13** | **2013-14** |
| **Toskur** | -25 | -25(-50)+frið. | -30(-40) | -25 | -40 | -50 | -50 | -25(+meir) | -25(+meir) | -20(+meir) | -30(+meir) |
| **Hýsa** | -25 | -25(-50)+frið. | -30(-40) | -25 | -40 | -50 | -50 | -25(+meir) | -25(+meir) | -20(+meir) | -30(+meir) |
| **Upsi** | -25 | -25 | -15(-25) | 0 | 0 | -20 | -20 | 0? | -10(+meir) | -10(+meir) | -10(+meir) |
| | | | | | | | | | | | |
| **Takast skulu øll hugsandi fyrivarni, tí hetta er ein sera stuttur samandráttur.** | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | |
| Kelda: Havstovan | | | | | | | | | | | |